Starvslýsing

Heimatænastan

Røktarstarvsfólk til Heimatænastuna í Suðurstreymoy

Søkt verður eftir røktarstarvsfólki til Heimatænastuna í Suðurstreymoy. Vit søknast eftir heilsurøktarum og heilsuhjálparum at starvast í blandaðum vaktum (vaktir eftir ynski) úti í Heimatænastuni.Talan er um føst størv. Størvini eru leys at søkja skjótast til ber. Eisini eru vit áhuga í at fáa røktarstarvsfólk at arbeiða tímalønt og at starvast sum feriuavloysarar.

Lønar- og setanarviðurskifti
Lønar og setanarviðurskifti eru sambart sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til økisleiðara Ceciliu Vestureið á telefon 217249 ella við telduposti: ceciliav@naerverk.fo

Umsókn
Send eina umsókn við avrit av prógvi og upplýsingum um útbúgving og fakligar royndir til:

Heimatænastan
Stílað: Cecilia Vestureið, økisleiðari,
Skálatrøð 14
Fo-100 Tórshavn

Umsóknarfreist: 26. mai 2008.

Sjúkrarøktarfrøðingur til Heimatænastuna í Suðuroy

Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingi at arbeiða 25 tímar um vikuna frá 1. juni 2008 ella skjótast møguligt. Talan er um fast starv.

Vit sóknast eftir sjúkrarøktarfrøðingi, sum
- hevur royndir innan heimarøkt
- evni at arbeiða sjálvstøðugt við ábyrgd
- koyrikort til persónbil er ein fyrimunur

Vit bjóða
- eitt starv við møguleika at menna starvs innihaldi
- eitt spennandi arbeiðspláss við nógvum røktarfakligum uppgávum
- eitt gott arbeiðsumhvørvi

Lønar- og setnartreytir
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag

Um tú ynskir at vita meir um starvið, ert tú vælkomin at ringja til økisskrivstovuna, tlf. 373907

Umsókn
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:

Heimatænastan øki 5
900 Vágur
Stílað. Jeanna í Lágabø, økisleiðari

Umsóknarfreist: 23. mai 2008

Les meira á www.naerverk.fo/leys størv

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

SØLA

Maskinur og amboð til sølu

Við hesum verða fylgjandi maskinur og amboð lýst til sølu:

Cat 980 lessari	árg. 1988	LV-GL 47
Cat 988 lessari við defektum motori	árg. 1987	LV-GL 44
Cat 966C lessari	árg. 1980	LV-GL 28

Kaðaltrumla á hjólum við uml. 150 m av kaðali + kaðaltrumla við uml. 300 m av AXOJ 1KV 3x240/72 kaðali.

Øll eru vælkomin at lata inn tilboð, antin upp á alt samlað ella einstakan lut. Tilboð upp á alt samlað kunnu verða tikin framum. Tilskilast skal, um tilboð er við ella uttan mvg.

Tilboð skulu vera í afturlatnum brævbjálva og vera Landsverki í hendi í seinasta lagi 22. mai 2008 kl. 15.00.

Maskinur og amboð kunnu eftirhyggjast eftir avtalu við Jóan Petur Patursson, rakstrarleiðara á Maskinmiðstøðini í Kollafirði, á tlf. 540 950.

Landsverk, Tinghúsvegur 5,
Postsmoga 78, Tórshavn,

Tel 340 800, Faks 340 801,
lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK
byggir land

Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.

Teknikapping

Altjóða tubbaksfríur dagur 31. mai

Altjóða tubbaksfríi dagurin, 31. mai, verður í ár um evnið: Roykfríur ungdómur.

Í sambandi við dagin skipar Fólkaheilsuráðið fyri eini teknikapping fyri børn og ung í hesum aldursbólkum:

a. Børn yngri enn 7 ár
b. 7-10 ár
c. 11-14 ár

Ein vinnari verður kosin í hvørjum aldursbólki, og fær hvør vinnari kr. 500 í virðisløn.

- Støddin á tekningunum skal vera 10x10 cm
- Boðskapurin í tekningini skal vera eitt skelti, ið vísir t.d:
  - At her er ikki loyvt at roykja, tí passiv royking rakar tey, ið ikki roykja
  - Tað er »kul« ikki at roykja
  - Royking er heilsuskaðilig
  - At keypa sigarettir er at spilla burtur pengar
  - Hvussu kanst tú siga »nei« til sigarettir?
    Børnini kunnu frítt velja, hvussu hetta skelti skal síggja út.
- Skrivið navn, føðingardag og telefon við blýanti aftanfyri á tekningini

Tekningarnar skulu vera Fólkaheilsuráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin 26. mai kl. 12.

Tekningarnar skulu sendast til:
Fólkaheilsuráðið
Eirargarður 2, 2. hædd
100 Tórshavn

Fólkaheilsuráðið
The Faroese board of public health